**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 7 |
| Tíð: | 06-07-23 Kl. 13:00 – 15:00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, Julianna Klett, kassameistari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireiking til Eldradagin 2023
2. Ársfundur hjá Landsfelag Penjónista
3. Ymiskt

AD 1 Fyrireiking til Eldradagin 2023

Avgjørt er, at Eldradagurin verður hildin fríggjadagin 20. oktober. Hetta er seinni enn vanligt, men fyrilit verður tikið fyri, at ársfundurin hjá Landsfelag Pensjónista verður hildin í Tórshavn 9. september.

Eldradagurin verður í ár hildin í Dansifrøi.

Skráin fyri dagin er sum frásagt seinast:

**”Hvat kann TK gera fyri at bøta um korini hjá eldri borgarum, sum ikki eru røktarkrevjandi”**

Arbeitt verður við at fáa nøktandi serfrøði at koma við íkøstum til dagin, og at fáa ein royndan fundarstjóra at stýra degnum.

AD 2 Ársfundur hjá Landsfelag Pensjónista

Avgjørt varð, at Eldraráðið verður umboðað á Ársfundinum, og at eykalimir eisini fáa í boði at luttaka. Luttøkugjaldið verður goldið av Eldraráðnum.

AD 3 Ymiskt

Rykt varð eftir fundarfrágreiðingini frá fundinum við borgarstjóran 13. juni.
*(Fundarfrágreiðingin kom dagin eftir fundin og er send limunum í Eldraráðnum).*

Tað hevur verið frammi í miðlunum, at serliga avtalan um vaskihjálp til pensjónistar kann verða avtikin. Hetta vóna vit sjálvandi ikki fer at henda, men vit taka undir við, at hjálpin bara verður veitt eftir visitatión.

Komandi fundur verður í Tilhaldinum hósdagin 17. august 2023 klokkan 13.

Fundur lokin klokkan 15.00

Tórshavn 10-07-2023

Petur Rouch,
skrivari